Arbeiðseftirlitið

søkir

eftirlitsfólk

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og kemur viðkomandi, umframt at hava vanligt eftirlit, eisini at taka sær av at sýna arbeiðstól.
Her verður serliga hugsa um regluligt eftirlit, úti á virkjum, av t.d.:

- Trukkum
- Kranum
- Billyftarum
- Persónlyftarum v.m.

Tann ið settur verður má tí hava koyrikort til persónbil.

Vit hugsa okkum at umsøkjarin hevur:

- Maskintekniska handverkara útbúgving s.s. maskinistur e.l.
- kunnleika til arbeiðsumhvørvislógina,
- góð evni at málbera seg skrivliga á føroyskum
- góð samstarvsevni og
- teldukunnleika.

Setanartreytir. Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum landsstýrið og viðkomandi yrkisfelag.
Miðja verður ímóti, at fáa starvi sett í seinasta lagi 1. mars 2003.

Upplýsing og umsókn. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, tlf. 317811 og tosa við Karl Joensen, stjóra.
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvi og møguligum ummælum skal, í seinasta lagi 17. februar 2003, sendast til:

Arbeiðseftirlitið
Boks 1134
110 Tórshavn

Tlf.: 31 78 11
Fax :31 44 89
T-postur: arb@arb.fo
Heimasíða: www.arb.fo

Arbeiðseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum høvuðsuppgávu at umsita løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi. Harumframt umsitur Arbeiðseftirlitið lóg um spreingievni, kavaravinnu, og løggildar vektir og nøgdarmátarar. Arbeiðseftirlitið hevur skrivstovu í Tórshavn, har 10 fólk starvast.

Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningum um arbeiðsumhvørvi, at:

1. vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenninginum í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisligan týdning,
2. hjálpa landsstýrismanninum við fyrireikingunum av reglunum sbrt. lógini,
3. áseta nærri fyriskipanir við heimild frá landsstýrismanninum,
4. kunna seg um teknisku og sosialu menningina í samfelagnum við atliti til at betra um arbeiðið, hvat trygd og heilsu í arbeiðsumhvørvinum viðvíkur,
5. viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, tøknilig hjálpartól v.m., evni og tilfar og geva loyvi, sum eru í samsvari við lógina ella fyrisitingarligar reglur,
6. ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

Vit vilja sjálvandi virka fyri, at tú fært best møguligu umstøður at arbeiða undir. Góða skrivstovu, lagaligar arbeiðstíðir og gott arbeiðsumhvørvi annars.

Barnagarðurin á Velbastað søknast eftir

Varaleiðara og sjúkravikari

Varðaleiðari:

- Hevur tú hug at nýta tínar praktisku royndir og í samstarvi við leiðara og starvsfólk at menna Barnagarðin til ein mynsturstovn?
- Hevur tú hug vera "sparringspartnari" hjá leiðaranum

Vit vænta:

- At tú hevur visiónir og hevur hug at verða aktiv/ur í leiðsuni og menningini av barnagarðinum.
- At tú er positiv/ur og sær trupulleikar sum uppgavur heldur enn forðingar.
- At tú hevur góð samstarvsevni, er fleksibil og torir at tosa um forðingar.
- At tú sær møguleikar og avbjóðingar í náttúruni.
- At tú hevur royndir frá dagstovni.
- At tú kanst byrja 1. februar ella 1. mars 03.

Sjúkravikarur:

Vit søknast eisini eftir einum avloysara at heita á undir sjúku og feriu. Viðkomandi kann rokna við inn ímillum at hava nógvar frídagar og at talan bert verður um fáar tímar summar dagar. Sjúkravikarurin skal vera tøkur skjótast tilber.

Løn:

Løn sambart sáttmála við Føroya Pedagog Felag.

Umsókn:

Umsøkn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 15. jan. 03. Nærri fæst at vita á Tel 32 81 21, spyr eftir Hannu Jacobsen ella Elsu Jacobsen.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Barnagarðurin á Velbastað er ein kommunalur stovnur við einari fíggjarætlan uppá 2,3 milliónir árliga. Stovnurin liggur í friðaligum umhvørvi við stórum spæliplássi og haganum rundanum.

Har eru 40 børn av Velbastað, úr Kirkjubø, úr Syðradali og úr Havn. Børnini eru millum 1/2 og 9 ár og eru í trimum stovum, har aldursbýtið er 0-2 ár, 2-4 ár og 4-9 ár. Tað eru 11 starvsfólk, svarandi til umleið 9 fulltíðarstørv.

Endamálsorðingin hjá stovninum er frá 1997 og soljóðandi: "Endamálið er at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar, bæði kropsliga og sálarliga og tryggja, at børnini faa nógvar og ríkar upplivingar. Vit ynskja, at børnini ótarnað skulu sleppa at spæla; harumframt skulu tey sleppa at vera við til at taka avgerðir, og starvsfólkini skulu lurta eftir teimum og geva sær stundir til tey."

---

egluligu b r ð un irnir

unav ar b r ð

verða hesar dagar kl. 16.00 í býráðshøllini:

30. januar	27. februar
27. mars	24. apríl
29. mai	26. juni
28. august	25. september
30. oktober	27. november.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, skulu verða býráðnum í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

unav ar b r ð

Runavíkar Kommuna

HERBALIFE

Du bliver hvad du spiser
Vægtkontrolprogram - Kosttilskud
Ring (0045) 7022 2708 eller kig på www.helsetorvet.dk

www.sosialurin.fo

uður ar rðari ra a i

Sagt verður frá, at limagjaldið hækkar frá 1/1-03 við kr. 15,00 um mánaðin fyri A - B limir.
Frá kr. 195,00 til kr. 210,00.

Internet Sosialurin

---

rar tar r ð ingur til v l ar eimið aina

Vit søknast eftir einum sjúkraróktarfrøðingi á starvsbrøki umleið 0,8 í skiftandi vaktum til setan 1. mars 2003.

Starvið er lønt sambært sáttmála hjá Felagnum Føroyskir Sjúkraróktarfrøðingar.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ásu Kiærbech Olsen, fyristøðukvinnu, telefon 311840.

Umsóknarfreistin er 22. januar 2003.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

v l ar eimið aina
Att: Fyristøðukvinnan
Gundadalur 7
100 Tórshavn

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Avl ari ri etur rivara

Av tí at ov fáar umsóknir komu inn í fyrsta umfari, verður søkt umaftur eftir barnsburðaravloysara fyri setursskrivaran á Fróðskaparsetri Føroya frá 1. februar til umleið 1. oktober 2003. Setursskrivarin hevur leiðsluna og ábyrgdina av Setursskrivstovuni, sum er miðfyrisiting Fróðskaparsetursins.

Uppgávurnar hjá Setursskrivstovuni eru nógvar og fjølbroyttar og fevna m.a. um: fíggjarmál, starvsfólkamál, almennar fyriskipanir og reglur fyri stovnin, langtíðar ráðlegging, hølismál, tilrættalegging og uppfylging av setursráðsfundum, samskifti við miðfyrisiting landsins, samskifti og samstarv við aðrar stovnar og universitet, felags tiltøk, kunning og samskifti yvirhøvur.

Umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni. Fyrimun hevur tann, ið hevur arbeiðsroyndir í almennari fyrisiting. Umráðandi eru góð samstarvsevni og sjálvstøðugt arbeiðslag.

Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi akademikarafelag. Starvið er ikki endaliga flokkað, men verður fyribils lønt sum deildarleiðarastarv.

Umsókn við curriculum vitae, próvskjølum og møguligum viðmælum skal stílast til rektaran og vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi 20. januar 2003, kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará setursskrivara á tel. 352500 ella teldupost annikas@setur.fo

A A A
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

Fróðskaparsetrið er sjálvsognarstovnur, ið hevur til endamáls at inna gransking, geva frálæru á hægri stigi og breiða út kunnleika um vísindalig háttaløg og úrslit. Umleið 55 fólk starvast í løtuni á Fróðskaparsetrinum og teimum stovnum og verkætlanum, sum Setursskrivstovan fyrisitir.

Setrið hevur tríggjar megindeildir: Føroyamálsdeild, Søgu- og samfelagsdeild og Náttúruvísindadeild. Fyrisitingin av stovninum liggur hjá Setursskrivstovuni, sum stendur beinleiðis undir rektaraembætinum. Umframt hetta liggur fyrisitingin av fleiri eksternum verkætlanum, Stovnunum á Debesartrøð og Altjóða Skrivstovuni eisini hjá Setursskrivstovuni. Umframt rektaran og setursskrivaran starvast í løtuni 5 fólk á Setursskrivstovuni.

---

vi e

Søkt verður eftir fólki til skiftandi arbeiðstíðir, uml. 35 tímar um vikuna, at byrja skjótast gjørligt.

Ring og hoyr nærri á **tl** ella .

vi e rnab

Starv

Fólk til frankering

Strandfaraskip Landsins søkja við hesum eftir frankeringsfólki til farmaflutningsdeildina.

Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini
Høvuðsuppgávan hjá Farmaleiðum er at samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum
Høvuðsuppgávur eru:

- Planlegging
- Rakstur
- Koyrisamskipan
- Skipaavgreiðslur
- Frankering

Starvið fevnir um
Tann, sum settur verður, skal fyriskipa rokniskaparligu skrásetingarnar hjá deildini, herundir uppgerð av innanhýsis bókingum o.a.
Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Telefonavgreiðsla
- Viðskiftamóttøka
- Hagtøl

Førleikakrøv

- HH, skrivstovuútbúgving e.l.
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki til Navision
- Góðan røkjuskap

Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 08. januar 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til: Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á Tel 343060, e-post: *hab@ssl.fo*

Høvuðsuppgávan hjá SL er at røkja landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 160 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 30 - www.ssl.fo

Felagið Tórshøll

Hetta vikuskifti spæla FLÚRAR

Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22 Tlf. 31 15 65

Lesið Sosialin

Broytingar

eið

al an i r m na egnum anuar

Frá 6. januar verður einans koyrt í gjøgnum bygdirnar Viðareiði, Hvannasund og Norðdepli, fyrsta og næsta túr á morgni.

Allar aðrar túrar verður einans støðga á hesum støðum:

Á Viðareiði:	á Brúgaskiftinum og á Grønma
Í Hvannasundi:	við byrgingina
Í Norðdepli:	við byrgingina
Í Klaksvík:	við Sandin, á ferjuleguni og á Kósini

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini tlf. 34 30 30.

Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS